Vikuskiftis Sosialurin





## Jólakonsert við Magna Christiansen

Fólkakæri sangarin Magni Christiansen undirheldur 6. desembur í Áarstovu. Á hugnaligu konsertini, sum Meginfelag Føroyskra Studenta skipar fyri, framførir hann nýggjar sangir og ymisk jólaløg. Nú jólini standa fyri durum er hetta ein góður møguleiki at koma í veruligt jólahýri. Prísurin er 100 krónur, men einans 50 fyri limir í MFS. Á staðnum verður møguligt at keypa holukøkur og gløgg fyri einans 10 krónur. Dyrnar lata upp kl 20 og øll eru vælkomin.

# Føroyskar jólakonsertir í Keypmannahavn



Føroyski vokalbólkurin, Mpiri, sum er mannaður av 14 útisetum fer komandi tíðina at halda jólakonsertir um í Keypmannahavn.

Bólkurin er mannaður av dugnaligum sangarum og hevur 10 ár á baki, har tey hava givið tríggjar fløgur út og hava verið á konsertferðum í Spania, Íslandi, Finnlandi, Svøríki, Týsklandi, Danmark og Føroyum.

Tað er danin Gorm Larsen, ið er útbúgvin kór- og orkesturleiðari frá Kongaliga Danska Musikkkonservatoriinum, sum stjórnar kórinum. Umframt tað hevur hann lært á Royal College of Music í London og lisið Tónleikavísund á universitetinum í Århus.

Á jólakonsertunum í ár verða føroyskir, russiskir og franskir sangir á skránni. Millum annað verk eftir Trónd Bogason, Per Nørgaard, Pjotr Tjajkovskij og Franc Poulenc, umframt satsir frá føroysku jólafløguni, sum bólkurin gav út í fjør.

Konsertirnar í ár liggja soleiðis: 7. desember klokkan 16 í Bellahøj Kirke, Frederikssundsvej 125A í Brønshøj, 10. desember klokkan 20 í Fredens Hus, Øster Allé 25 í Keypmannhavn, og 13. desember klokkan 17 í Helligaands Kirke á Strøgnum í Keypmannahavn.

Meiri kann lesast um føroyska útisetavokalbólkin á www.mpiri.org.

# Vetur í listasavninum á Sandi

Listasavnið á Sandi arbeiðir nú eftir vetrarskránni, sum merkir at savnið er opið sunnudagar frá 14-16. Tó ber til hjá bólkum at gera seravtalur. Virksemið á vetri er nakað minni enn um summarið, men seinastu árini hevur tað víst seg, at ferðaløg av ymsum slagi hava hug at gera hugnaligar útferðir. Her er listasavnið millum møguleikarnar at hava á skránni. Til ber at ringja á tlf. 211924 ella 361617 í hesum sambandi.

Sunnudagin 7. desember verður filmurin »Ein regla um dagin man vera nokk«, eftir Katrin Ottarsdóttir sýndur. Filmurin lýsir listamannin Tórodd Poulsen. Sýningin byrjar klokkan 15.

Mikudagin 10. desember verður serligur jólahugni í sambandi við 95-ára føðingardag Sofus Olsen:

Tú stjørna blonk, Jákup Reinert Hansen, prestur, lesur hugleiðingar um vetur og jól eftir Jákup Dahl, próst. Sangir eftir Jákup Dahl verða sungnir.

Hugnakvøldið byrjar klokkan 20, verið vælkomin.

# Jólaleikir í Dramaverkstaðnum

Leikaløtan 2008 verður í ár í døgnum 5. til 14. desember, sýningarnar verða klokkan 18 gerandisdagar og klokkan 16 og 18 í vikuskiftunum. Næmingar á Dramaverkstaðnum framføra leikin "Ársins Nissa", "Lítli Gutti" og afturvendandi tátturin "Søgan" er eisini á skránni.

Tað eru børnini í aldursbólkinum 11-13 ár, sum framføra leikin "Ársins Nissa", ið snýr seg um stríðið jólamaðurin og nissurnar hava í hesum tíðum, og omaná tað skal ársins nissa kjósast. Onkur heldur seg vera betri enn onkur annar og nógvur trupulleikar skulu loysast.

Yngstu næmingarnir framføra fittu søguna um eingilin lítla Gutta, sum hevur verið framførdur fleiri ferð. Marius Johannesen hevur skrivað leikin.

Eins og undanfarin ár er stórur dentur lagdur á, at yngstu børnini eisini skulu fáa nakað burturúr. Millum annað verður møguligt hjá børnum at verða málaði eins og tey í leikinum og fáa høvið at spæla við á pallinum, um tey ynskja tað.

Leikaløtan er um ein tíma til longdar og til ber at keypa atgongumerki á Kunningarstovuni og við dyrnar ein tíma undan sýning. Dramaverkstaðið liggur í brekkuni niðan á Nabb, beint undir grønu ítróttarhøllini í Havn.

So komið við til Leikaløtuna 2008 og fáið eina stuttliga løtu.



# Nógv jólatrø tendra í Tórshavnar kommunu

Hetta vikuskifti tendra ikki færri enn 9 jólatrø á bygd og í bý í Tórshavnar kommunu.

Í hesum sambandi halda prestar og umboð fyri býráðið røðu, tónleikur og kórsangur verður at hoyra, jólamenn verða at hitta, og ein drekkamunnur verður at fáa.

**Í tíðarrøð er skráin henda:**
Í Kirkjubø, við skúlan, fríggjadagin, kl. 17.00
Í Kaldbak, við skúlan, leygardagin, kl. 15.30
Á Argjum, við brúnna um Sandá, leygardagin, kl. 17.00
Í Norðradali, við skúlan, leygardagin, kl. 18.30
Í Nólsoy, leygardagin, kl. 16.00
Í Kollafirði, við skúlan, sunnudagin, kl. 16.00
Á Velbastað, við skúlan, sunnudagin, kl. 16.00
Á Hvítanesi, sunnudagin, kl. 18.00
Í Hesti, sunnudagin, kl. 18.00

Á www.torshavn.fo sæst útgreinað skrá fyri tendringina av jólatrøum og fyri tiltøk í kommununi í fram til jóla.

# Jólakonsert við Kristiliga Sangkóriðnum

Elsta kórið í landum, Kristiliga Sangkórið heldur jólakonsert í Kommunuskúlanum 6. desember klokkan 16. Konsertin er eisini ein jubileumskonsert, fyri at hátíðarhalda tað at kórið hevur 55 ár á baki.

Síðan stovnan í 1953 hevur kórið verið virkið og í dag telur tað 41 limir. Hanus Joensen er kórleiðari, men undan hon hava navnframir kórleiðarar verið, so sum Alfred Dahl, vanliga nevndur Beiggin, Eilif Samuelsen, Jóannes Nolsøe og Knút Olsen. Kórið heldur fast í at syngja kristiligt tilfar, sálmar og sangir, fyri tað mesta á føroyskum máli, hareftir á norðurlendskum.

Á konsertini leygardagin 6. desember verður afturlítandi tilfar framført og eisini yngri og eldri jólaløg.